# 87 ár og uppfinnari


Petur Højgaard vísir eitt modell av trolinum, har seglið situr á høvuðslínuni

**Nýggja uppfinningin skal gera, at skipið fiskar meira og hartil sparir olju**

TROL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sunnudagin fór trolarin Magnus Heinason at royndarkoyra eitt nýtt slag av troli, har tær 245 kúlurnar eru tiknar av, og ein pressending er sett á høvuðslínuna í staðin. Endamálið við nýggja trolinum er at fiska meira og at spara olju.

## Gamalt hugskot

Maðurin aftan fyri nýskapandi hugskotið er 87 ára gamli Petur Højgaard úr Saltangará, sum fekk skipsboð av Magnus Heinasyni sunnumorgunin. Petur fekk hugskotið fyri mongum árum síðani, tá hann eisini evnaði eitt royndarmodell til. Síðani hevur tað verið dreymur hansara at fáa tað royndarkoyrt. Seinasta heyst setti hann seg so í samband við Fiskirannsóknarstovuna og greiddi teimum frá um hugskotið. Síðani hevur stovnurin arbeitt víðari við hugskotinum, og er tað úrslitið av samstarvinum millum gamla sjómannin úr Saltangará og yngru granskarararnar úr Havn, sum nú skal roynast í verki. Petur Højgaard er gamal sjómaður. Hann fór til skips í 1934, og sigldi til hann legðist uppi í 1980. Hann sigur, at hann royndi hugskotið við Polarfarinum einaferð seinast í fýratiárunum, men at óvist var um tað riggaði tá. Í dag ber betur til, við ymiskum tólum at kanna, hvussu trolið gongur í sjónum.

## Kann gerast kollvelting

Teir á Fiskirannsóknarstovuni siga, at um royndin eydnast, og hugskotið elvir til, at trolið gapar eini 25 prosent meira, og at skipið kann spara eini 10 prosent av oljunýtsluni, kann uppfinningin gerast ein sonn kollvelting fyri trolvinnuna. Teir nevna talið 7 á einum skala á 10.

Hugskotið aftan fyri nýskapanina er, at ein pressending ella segl verður sett á høvuðslínuna í staðin fyri kúlurnar, sum vanliga halda trolinum flótandi. Sostatt lækkar vatnmótstøðan, trolið gapar hægri og verður lættari at draga. Endamálið er so, at trolið skal ganga hægri, samstundis sum at sleppast kann undan kúlunum. Oljusparingin kemur við, at trolið verður lættari at draga. Magnus Heinason verður aftur á Havnini týsdagin ella mikudagin.


Hóast Petur fekk skipsboð sunnumorgunin, ætlar hann sær ikki út við


Teir riggað seglið til, áðrenn tað verður surrað fast á høvuðslínuna

**Adventistaskúlin**

**sóknast eftir nýggjum lærara 1. august 2006**

Okkara skúli er ein frískúli, sum hevur virkað í 40 ár.
Hann hevur 116 næmingar frá 1. til og við 7. flokk

Vit eru 8 lærarar í føstum starvi og ein skúlaleiðari.
Vit eru ein kristin skúli, ið geggur dent á samanhald og felagsskap, har tað einstaka barnið fær stuðul til at mennast.

Vit royna at skapa eitt heildarsamstav millum heim og skúla, soleiðis at foreldrini uppfata skúlan sum ein longdan arm hjá heiminum og øvugt.

**Tað gera vit m.a. soleiðis:**
- Morgunsangur við søgu hvønn dag.
- Tætt samstarv millum starvsfólkini.
- Stutt frá hugskoti til verk.
- Vit síggja skúla okkara sum ein felagsskap, ið byggir á tryggleika, opinleika og álit millum øll, ið starvast her.

**Vit vænta at tú:**
- Hevur eina kristna lívsáskoðan.
- Ert góð/ur við børn.
- Kanst laga teg til ein fjølbroyttan gerandisdag.
- Hevur hugflog og áræði.
- Ert opin fyri nýggjum avbjóðingum
- Hevur hug at taka lut í menningini av skúlanum.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Gott arbeiðslag millum góðar starvsfelagar.
- Eitt flokslærarastarv í okkara 1. flokki, sum tú ført ábyrgdina av til og við 7. flokk.
- Góð foreldur at samstarva við.

Linjufak í ítrótti er ein fyrimunur.
**Umsóknarfreistin er 3 apríl.**
Umsóknin verður svarað skjótt.

**Skrivlig umsókn verður at senda til:**
Skúlaleiðaran Janne Schantz Johnsson
Adventistaskúlin
Hoyvíksvegur 56
100 Tórshavn